Hósdagur 7. februar

SVF

18.25 DV í kveld
18.30 Jumanji 3B
18.50 Aftur til Múla 2:2 (e)
19.20 Myndlist í Føroyum (e)
20.00 Dagur og Vika
20.20 Kjak
20.45 Afrika - eitt eðbvísi landafrásagn 3:4 - afrikanskt/evrópsk rað
21.10 Airport - úr Heathrow flogheyn
21.35 Kimitimia: Undir ilgrusa 2 1:4 - viðfeldant amerikk kriminalrað
22.30 Vald endanna II
23.15 Vald endanna - eyka
23.25 Líðugt

EUROSPORT

7.30 Sailing - Ocean Race
8.00 Golf - US PGA Tour
9.00 Olympic Games - The Spirit of Winter
9.30 Olympic Games - From Lillehammer to Nagano
10.30 Olympic Games - Olympic Salt Lake Special
11.00 Snowboard - FIS World Cup
11.30 Snowboard - FIS World Cup
12.00 Figure Skating - European Championships
13.30 Ski Jumping - World Cup
15.00 Ski Jumping - World Cup
16.00 Football - African Cup of Nations - Live
18.00 Football - Kick In Action Special Africa
18.30 Football - Kick In Action Special Africa
19.00 Football - African Cup of Nations - Live
21.00 Boxing - International Contest
22.00 News - Eurosportnews Report
22.15 Football - African Cup of Nations
23.45 Xtreme Sports - Yoz Mag
0.15 News - Eurosportnews Report
0.30 Close

BBC PRIME

0.00 TLZ: »Horizon – Atlantis Reborn«
1.00 TLZ: »In the Blood – Lost Tribes«
2.00 TLZ: »Dramsci – Learning to Love the Grays«
2.30 TLZ: »Hollywood Science«
2.40 TLZ: »Mind Blase«
2.45 TLZ: »Forensic – Lab Detectives«
3.00 TLZ: »Edison – The Invention of Inventions«
3.50 TLZ: »Mind Blase«
3.55 TLZ: »Science Bites – The Virtually Perfect Yacht«
4.00 TLZ: »The Big Deal – Headhunters«
4.40 TLZ: »Science in Action – Microbes«
5.00 TLZ: »France Inside Out – Montpellier«
5.30 TLZ: »The Ozmo English Show«
6.00 Jackanory: »Fowl Fest«
6.15 Playdays: »The Poppy Stop«
6.35 Get Your Own Back
7.00 Ready Steady Cook
7.45 Garden Invaders
8.15 House Invaders
8.45 Bargain Hunt
9.15 Zoo Keepers
9.45 Vets in Practice: »Horses for Courses«
10.15 The Weakest Link
11.00 Dr.Who: »Trial of a Timelord – The Mysterious Planet«
11.30 Doctors
12.00 Eastenders
12.30 Hetty Wainthropp Investigates: »Family Values«
13.30 Ready Steady Cook
14.15 Jackanory: »Fowl Fest«
14.30 Playdays: »The Poppy Stop«
14.50 Get Your Own Back
15.15 TOTP Eurochart
15.45 The Naked Chef: »Girls Girls Girls«
16.15 Charlie's Garden Army: »Invergordon«
16.45 Miss Marple: »A Caribbean Mystery«
17.45 The Weakest Link
18.30 Doctors
19.00 Eastenders
19.30 Vicar of Dibley: »Winter«
20.10 Garfield: »Instinct«
21.00 A Bit of Fry and Laurie
21.30 A History of Britain: »Revolution«
22.30 The Big Trip
23.00 Casualty

BBC WORLD

0.00 BBC News – followed by Weather
0.30 HARDtalk (r)
1.00 BBC News – followed by Weather
1.30 Holiday (r)
2.00 BBC News – followed by Weather
2.30 Reporters (r)
3.00 BBC News – followed by Weather
3.30 Asia Today (r)
3.45 World Business Report (r)
4.00 BBC News – followed by Weather
4.30 HARDtalk
5.00 BBC News – followed by Weather
5.30 World Business Report
6.00 BBC News – followed by Weather
6.30 World Business Report
7.00 BBC News – followed by Weather
7.30 World Business Report
7.45 Sport Today
8.00 BBC News – followed by Weather
8.30 Holiday (r)
9.00 BBC News – followed by Weather
9.30 Simpson's World (r)
10.00 BBC News – followed by Weather
10.30 Asia Today
10.45 Sport Today
11.00 BBC News – followed by Weather
11.30 HARDtalk (r)
12.00 BBC News – followed by Weather
12.30 World Business Report
12.45 Sport Today
13.00 BBC News – followed by Weather
13.30 The Cat's The Star (r)
14.00 BBC News – followed by Weather
14.30 Simpson's World (r)
15.00 BBC News – followed by Weather
15.30 Asia Today
16.00 BBC News
16.30 HARDtalk (r)
17.00 BBC News
17.15 World Business Report – followed by Weather
17.30 Talking Movies (r)
18.00 BBC News – followed by Weather
18.30 World Business Report
18.45 Sport Today
19.00 BBC News – followed by Weather
19.30 HARDtalk (r)
20.00 BBC News – followed by Weather
20.30 Click Online
21.00 BBC News – followed by Weather
21.30 World Business Report
22.00 BBC News – followed by Weather
22.30 Panorama
23.00 BBC News – followed by Weather
23.30 World Business Report (r)
23.45 Asia Today

3

5.30 Barna-hjørnet með Disney
7.00 TV-shop
8.00 Hvíla lagna
8.25 Ricki Lake
9.15 Ricki Lake (G)
10.10 Horton-sagan (G)
11.00 Horton-sagan
11.50 Vild med dig
12.20 Fæn pige – sej sild
12.50 Baywatch Hawaii
13.45 Felicity
14.40 Barna 2002 (G)
15.10 7 Days
16.05 Ricki Lake
17.00 Susan – sod og single
17.30 Sabrina - skolens heks
18.00 Alla alslar Raymond
18.30 Barna 2002
19.00 Skadestuen
20.00 Barna 2002 – direkta
21.00 Sex and the City
21.30 Strong Medicine
22.30 Barna 2002 (G)
23.00 Barna 2002 – direkta (G)
0.00 Vora verste ár
0.30 Simpsons
1.00 Nash Bridges
2.00 Ricki Lake (G)
2.50 Drom videre
3.20 Vora verste ár (G)
3.45 Tærningen
4.10 Sunset Beach
4.55 Godnet

ÚF

7.00 Tíðindi
7.05 Morgunlestur - Henning Tausen í Hoyvík lesur
7.15 Barnalotan - Jonna Olsen og Kári Sólstein leggja til rættis
7.30 Tíðindi
7.35 Morgunmúsin
8.00 Tíðindi
8.03 Morgunmúsin
9.00 Tíðindi
9.03 Sjónamiðgurin (e) - Arni Joensen leggur til rættis
9.35 Dagsins tónar
9.50 Morgunlestur (e) - Henning Tausen í Hoyvík lesur
10.00 Tíðindi
10.03 Fimleikalotan 1
10.10 Tit skriva, vit spæla - Óssur Egholm skipar fyri
11.00 Tíðindi
11.03 Á seygarna vaningjum (e) - Gunnver Poulsen leggur til rættis
11.35 Undir dagráðs
12.00 Vaðurtíðindi
12.02 Miðdegistónleikur
12.15 Skreiðir og lýsingar
12.20 Tíðindini
12.40 Dagurráðstíðir
13.00 Tónsetimin
14.00 Fimmarin (e) - Sigmar Bláberg leggur til rættis
15.00 Tíðindi
15.03 Nýtt og gott gamalt - Famja Petersen velur lagini
16.00 Tíðindi
16.03 Bitar úr Billboard - Rúni Jákupsson stiðr fyri
17.00 Tíðindi
17.05 Ivingerðinarn - Victor Carlsen stiðr fyri
18.00 Barnalotan (e) - Jonna Olsen og Kári Sólstein leggja til rættis
18.25 Skreiðir og lýsingar
18.30 Tíðindini
19.00 Tilvera: Deyðssyndirnar - Ármgerð Árge leggur til rættis
19.30 Crescendo - Kári Olsen stiðr fyri
20.30 Bar Benson - Marius Johannesen lesur 11. part av fremleiðslusagn eftir Johan Fellborgat
21.00 Tíðindi
21.05 Dagsetur - Óssur Egholm leggur til rættis
22.00 Lýðmálurin - Regin Egholm skipar fyri
23.00 Tíðindi

Rás 2

9.45 Oriðið - Biblíulestur v/Anju Hansen
10.00 Leyslotan (e) - Endursending frá í gjár - Inuslog, prát og tónleikur - Sonna Smith og Sunnøva Petersen leggja til rættis
11.00 Tónleikur
12.00 Tíðindi og kunngerðir
12.15 Tónleikur
13.00 Yeskiðtan - Heilsar frá lurtarum - Sunnøva Petersen er vertur - Send heilsur um (www.ras2.fo) ella á fax. 359990
14.00 Lýsingar
14.05 Yeskiðtan (framhald)
15.00 Tíðindi og kunngerðir
15.15 Leyslotan - Inuslog, prát og tónleikur - Sonna Smith og Sunnøva Petersen leggja til rættis
16.00 Fótbóltsprát - John William Joensen leggur til rættis, sum tvarður úr Studio 7 - Gestarin hesa vikuna er Jóhannes Jacobsen
17.00 Hordhlýsið - Aktuell sending úr Studio 7 í Klaksvík - John William og Oliver Joensen leggja til rættis
18.00 Tíðindi og kunngerðir
18.15 Tónleikur
19.00 Orð á leiðini (Evl) - Evnt barndómur og uppvoksur - Jógvan Zachariassen leggur til rættis
19.40 Tónleikur
21.00 Tíðindi og kunngerðir
21.15 Oriðið (e) - Endursending frá í morgun - Biblíulestur v/ Anju Hansen
21.30 Tónleikur
22.00 Girlzone - Undirhaldssending fyri ung, Súzanna Clementsen og Ruth Reinert skipa fyri - Telefon: 35 99 93 Fax: 35 99 90 E-mail: girlzone@ras2.fo
0.00 Líðugt

Tilvera: Deyðssyndirnar

ÚF Høskveldið kl. 19.00

Í fyrstu sendingini um deyðssyndirnar verður nortið við tað søguliga: hvørjar tær sjey deyðssyndirnar eru. Í hesi sendingini siga nakrir samkomuleiðarar frá, hvat teir halda synd vera.

Baren 2002 – Direkte

Enn einaferð er klárt til ein nýggjan umgang av Baren beinleiðis úr Lufkastellet á Christianshavn við vertinum Alex Nyborg Madsen.

Sex & the City

Tær fýra vinkonurnar seta spurnartekin við teirra egna seksuella máta at uppføra seg uppá, tá drongurin hjá Carrie vil biða við at hava sex til tað kennist rætt. Nýggja flamman hjá Charlotte hevur ein øsjarmerandi vana í songini, og Miranda uppdagar, at hon hevur fingið eina kynssjúku. Aftaná, at tað verður rætt frá einum granna hjá Samanthu, verður peikifingurin rættur imóti henni, tí hon hevur so nógva vitjan um nattina…

ÚF Morgunlestrar 4.–9. februar

Henning Tausen í Hoyvík lesur

Sálmar og skriftstøð:

Mánadagin 4. februar:
nr. 146 Gott sáð, ið út var sáað

Týsdagin 5. februar:
nr. 413 O, Harra Krist, ver tú hjá mær

Mikudagin 6. februar:
nr. 7 Um altið hvør mín limur

Høsdagin 7. februar:
nr. 1 Harra Guð, títt dýra navn og æra
nr. 4 Heilagt ljóð oss legg á tungu

Friggjadagin 8. februar:
nr. 250 Tín ríkis søk, mín Jesus, skal

Leygardagin 9. februar:
nr. 401 Frels oss, Guð, frá hinum illa
nr. 406 Bið, o, Jesus, fyri mær

UTTAN ÚR HEIMI

-Vit áttu at havt myrt Arafat

Ariel Sharon iðrar seg um, at hann ikki gav ísraelska herinum boð um at beina fyri Arafat í Libanon í 1982
Mynd: Reuters

Ísraelski forsætisráðharrin, Ariel Sharon, iðrar seg um, at hann ikki gav boð um at myrða Yasser Arafat í Libanon fyri 20 árum síðani

MIÐEYSTUR
Árni Joensen

- Í Libanon var ikki semja um at beina fyri Yasser Arafat, men sjálvur iðri eg meg um, at vit ikki beindu fyri honum, sigur Ariel Sharon í samrøðu við ísraelska blaðið Maariv. Blaðið prentaði ein part av samrøðuni í gjár, og í dagsins útgávu er hon prentað í heilum líki.

Sharon var verjumálaráðharri, tá ísraelski herurin kringsetti Arafat og PLO-deildir hansara í vestara parti av Beirut á heysti í 1982. Ísraelska flogvápnið søkti fleiri ferðir at teimum plássunum, sum Arafat fjaldi seg í, til palestinski leiðarin fekk frítt at fara til Tunis.

Hóast tey beisku orðini sigur Sharon tað ikki vera óhugsandi, at hann einaferð í framtíðini fer at samráðast við Yasser Arafat. Men treytirnar eru greiðar:

- Tekur Arafat tey stig, sum vit krevja, at hann skal taka, kann tað hugsast, at vit fara at samráðast við hann, sigur Sharon í samrøðuni við Maariv.

Búskapur og vinna:

Sparifundur í SAS

Týsdagin í næstu viku fer leiðslan í skandinaviska flogfelagnum SAS á fund við umboð fyri fleiri donsk, norsk og svensk fakfeløg um eina spariætlan, sum leiðslan hevur gjørt av at seta í verk.

Leiðslan hevur sent fakfeløgunum eitt uppskot um sparingar, og seinastu dagarnar hava feløgini viðgjørt tað. Nøkur feløg hava góðtikið ymsar loysnir, sum leiðslan er komin við, men onnur hava ivast.

Stjórin í SAS, Jørgen Lindegaard, hevur fyrr sagt, at lønarútreiðslurnar hjá felagnum mugu skerjast við tí, saum svarar til 3500 heilársstørv. Talan verður tó ikki um so nógvar uppsagnir, tí ætlanin er at finna ymsar aðrar loysnir.

Missa av Enron

Húsagangurin hjá risastóru amerikansku orkufyritøkuni Enron rakar eisini norsku feløgini Statoil og Norsk Skog. Bæði feløgini eru á listanum yvir fyritøkur, sum eiga pengar til góðar hjá Enron, men hvørki teirra vil upplýsa, hvussu nógvar pengar talan er um.

Kunningarstjórin í Statoil, Kai Nielsen, sigur kortini, at upphæddin, sum felagið eigur hjá Enron, fer ikki at fáa nakra ávirkan á Statoil. At Norsk Skog eisini stendur til at missa pengar kemst av, at dótturfelagið Norsk Skog Canada eigur pengar til góðar hjá Enron.

Eisini tað almenna í Noregi missir pengar av Enron-húsagangin um, tí almenni oljugrunnurin er millum partaeigararnar í amerikansku fyritøkuni. Tað hevur eisini ljóðað, at norðurlendski bankin Nordea stendur til at missa pengar, tí at Enron hevur eitt lán í norska Kreditkassen, sum er ein partur av Nordea.

Bjóða flóttafólki pengar fyri at fáa tey av landinum

Myndugleikarnir í Avstralia eru sinnaðir at rinda 4000 flóttafólkum pengar fyri at fáa tey av landinum

Avstralska stjórnin er komin við tilboðnum eftir áhaldandi mótmæli frá fólki, sum finnast at harðrendu framferðini hjá myndugleikunum ímóti útlendsku flóttafólkunum. Meiri enn 200 flóttafólk hava verið í hungursverkfalli, og fleiri hava roynt at taka lívið av sær fyri at mótmæla mannagongdini hjá myndugleikunum.

Tey umleið 1100 afghansku flóttafólkini, sum eru í Avstralia, fáa nú tilboð um pengar, vilja tey venda heimaftur.

- Taliban er ikki við valdið í Afghanistan longur, og tí dugi eg ikki at síggja, hví flóttafólkini ikki kunnu fara ehimaftur, segði John Howard, forsætisráðharri í morgun.

Hann legði afturat, at stjórnin heldur tað ikki vera óríminligt at biðja fólkini fara aftur til hús

Ivi um, hvar Margareth Thatcher skal standa

Undirhúsið hevði verið hóskandi pláss til standmynd av Thatcher, men tað letur seg ikki gera - ikki enn í hvussu er.

Í Bretlandi keglast politikarar um, hvar teir skulu seta eina standmynd til heiður fyri fyrrverandi forsætisráðharran Margareth Thatcher.

At tann tveir metrar høga og tvey tons tunga standmyndin ikki sleppur í Undirhúsið at standa hevur einki við tað at gera, at Arbeiðaraflokkurin nú situr við valdið í Bretlandi. Reglurnar siga, at tílíkar standmyndir kunnu ikki setast í Undirhúsið, so leingi viðkomandi persónur er á lívi.

Talsmenn hjá Arbeiðaraflokkinum hava sagt, at hóast teir als ikki taka undir við tí politikki, sum Margareth Thatcher rak, so slepst ikki uttan um tann veruleika, at hon hevur sett sær spor í bretsku søguna sum landsins fyrsti kvinnuligi forsætisráðharri.

Spurningurin er bert, hvar Margareth Thatcher skal standa.

Úr Norðurlondum:

Størri skattasvik

Danski professarin Ole Bjørn væntar, at sparingarnar, sum stjórnin ætlar at seta í verk í toll- og skattaverkinum, fara at elva til størri skattasvik. Hann vísir á, at svik av hesum slagnum er veksandi allastaðni, og tí væntar hann, at eitt skert eftirlit kann koma at kosta danska statskassanum nógvar pengar.

Stjórnin hevur boðað frá nógvum uppsagnum í toll- og skattaverkinum, og tað hevur verið nevnt, at meiri enn 1100 fólk skulu sigast upp. Ole Bjørn, sum er fyrrverandi formaður í Líkningarráðnum, sigur, at tær nógvu uppsagnirnar fara at geva skattasvikarunum rúmari ræsur.

Seinastu árini hevur danska toll- og skattaverkið lagt stóran dent á at bøta um eftirlitið við roknskapum hjá fyritøkum, eins og størri dentur er lagdur á at kanna, at reglurnar um meirvirðisgjald og onnur avgjøld verða hildnar. Hetta arbeiðið fer nú fyri skjeyti, væntar Ole Bjørn.

Færri flokslimir

Ein uppgerð av limatalinum í teimum politisku flokkunum í Noregi vísir, at færri og færri fólk leggja í at vera limir í flokkunum. Sambært uppgerðini eru tað serliga teir báðir stóru flokkarnir, Arbeiðaraflokkurin og Høgri, sum hava mist nógvar limir seinnu árini.

Eitt nú hevði Arbeiðaraflokkurin 128.000 limir í 1990, men nú er talið bara 52.800. Hjá Høgra var limatalið fyri tólv árum síðani 107.000. Í dag er tað 52.400.

Einasti flokkur í Noregi, sum hevur havt veksandi limatal, er Framburðsflokkurin, sum um ársskiftið hevði næstan 30.000 limir.